# Stórfingin føroysk mentan á Ørkini

**Í sambandi við átakið hjá Ørkini í Reykjavík seinasta vikuskifti, var ein mentunnarligi parturin, og var her talan um listaframsýning og gospelsang**

ÁTAK Í ÍSLANDI
*Óli Jacobsen*



*Listarfólkini Jógvan Purkhús, Sigrund Gunnarsdóttir og Oggi Lamhauge*



*Málningur hjá Jógvan Purkhús: Av Nesi í Eysturoynni*

Fríggjadagin kl. 17 var føroyska listaframsýningini á føroyska sjómansheiminum Ørkin í Reykjavík opnað. Framsýnarar eru Sigrun Gunnarsdóttir, Karl Olgar Lamhauge og Jógvan Purkhús. Tey bæði fyrru eru væl kend í Føroyum. Jógvan Purkhús fór sum blaðungur til Íslands fyri einum 40 árum síðani, og tað er ikki so langt síðan, at hann byrjaði at mála og tekna. Hann er klaksvíkingur og hevði fyri nøkrum árum síðani framsýning í Klaksvík, har hann fekk góð ummæli.

Tað var heilt fitt av fólki til staðar, tá framsýningin var opnað. Tað var talan um føroyingar, sum vóru komnir til Íslands í samband við ráðstevnuna um møguleikarnar við Hoyvíkssáttmálanum, og so var eisini fitt av føroyingum, sum búgva í Íslandi, komnir umframt onkrir íslendingar.

Símin Hansen, fyristøðumaður á Ørkimi, bjóðaði vælkomin. Síðan sang kórið SALT ein sang.

So fekk danski sendimaðurin í Íslandi, Lasse Reimann, orðið fyri at opna framsýningina.

Hann byrjaði við at taka til, hvussu væl SALT dugdi at syngja. Síðan tók hann eisini til, hvussu vítt henda framsýning spenti við sera ymiskum listarfólki við hvør sínum stíli. Hetta var í sær sjálvum prógv fyri fjølbroytnið í føroyskari list.

Hann fegnaðist eisini um ta ráðstevnu, sum skuldi vera ein annar partur av hesum tiltaki á sjómansheiminum. Hon var ikki minst aktuel í samband við nýggja Hoyvíkssáttmálan, sum eigur at kunna geva føroyingum sera góða marknaðaratgongd í Íslandi við munandi størri fríhandli enn fyrr.

Síðan takkaði sendiharrin sjómansheiminum fyri gott samstarv og tók til, hvussu gott umboð, hon hevði verið fyri Føroyar í Íslandi. Samstarvið var ikki minst av týdningi, tá føroyingar og aðrur ríkisborgarar av eini ella aðari orsøk "stranda" e í Íslandi. Tá livdi Ørkin altíð upp til orðatakið, at har tað er hjartarúm er eisini húsrúm, og hon kundi sum ein onnur ørk hýsa hesum fólkum.

Sendiharrin vísti eisini til tvær aðrar Føroyskar listarframsýningar í Íslandi í hesum døgum. Onnur var hjá Zacharias Heinesen á Hafnafjørðinum, og hin er í Keflavík, har Kári Svensson luttekur. Tað er ikki hissini av føroyskari mentan í Íslandi í hesum døgum.

Síðan sang SALT aftur, og fólkið var boðið at hyggja at myndunum. Tey trý umrøddu listarfólkini hava 38 listarverk sýnd fram, og størsti parturin av teimum var til sølu og okkurt teirra varð selt beinanvegin. Afturat teimum finst eisini onnur list á sjómansheiminum, sum t.d. Mikines og Lasse S. Framsýningin er opin í umleið ein mánaða.

## Gospel

Gospelparturin av tiltakinum var eisini sera hugtakandi. Talan var um tveir bólkar úr Eysturoynni, hvør betri enn annar. Annar er SALT. Hin er Terji Vestergaard og Lisa Frederiksberg við tónleikarum. Hesir bólkar vóru við til ymiskar framførslur. Ein teirra var ein gospelkonsert í Filadelfia, sum er hvítusunnusamkoman í Reykjavík. Henda konsertin varð útvarpað í Lindunum bæði í Føroyum og Íslandi. Øll vóru samd um, at hetta var ein hugtakandi løtu við sangi, tá hann var allarbest.

Bólkarnir vóru eisini við til onnur tiltøk á kristiligum samkomum sunnudagin.

Tískil var eisini á hesum økinum talan um eina framúr umboðan av Føroyum í Íslandi.



*Lisa, Terji og Rasmus*



*SALT syngur. F.v. Paula Gaard, Elsebeth Lassaberg, Karolina Højgaard, Johan Magnus Olsen, Óli Christian á Torkilsheyggi og Bárður Lakjuni. Aftanfyri sæst list hjá Sigrun*


Gjaldstovan hevur um hendi Landsroknskapin, Búskaparskipan landsins, og ein stóran part av almenna bókhaldinum.

Á Gjaldstovuni arbeiða 32 fólk.

Kjarnin í Búskaparskipan landsins er Oracle E-business suite. Av øðrum skipanum kunnu verða nevndar:
- Felags lønarskipan
- Búskettskipan
- Leiðslukunningarskipan
- Dátuvøruhús.

Í kreditorabókhaldinum verða rokningar til tað almenna ljóslisnar (skannaðar) og neyðugar skrásetingar verða framdar. Síðan verða rokningarnar sendar víðari í eini verkgongdarskipan elektróniskt til teir ymsu almennu stovnarnar. Kreditorarbókhaldið hevur um hendi umsitingina av øllum rokningarflowinum, t.e. at yvirvakja og alla verkgongdina frá móttøku til goldið verður. Í hesum liggur t.d. at gera feilrættingar og at kanna, hví rokningar ikki verða avgreiddar. Kreditorabókhaldið hevur eisini um hendi at svara fyrispurningum og at testa broytingar í skipanini. Í løtuni eru einir 300-400 brúkarar av rokningarverkgongdarskipanini.

Arbeitt verður í løtuni við, at tað almenna skal hava rokningar elektróniskt.

Talan er um góðar arbeiðsumstøður, bæði tá ið ræður um høli og útbúnað. Gjaldstovan arbeiðir við førleikamenning, hevur eina flekstíðarskipan, og í Fíggjarmálaráðnum eru góð kantinuviðurskifti.

www.gjaldstovan.fo

## Starv í kreditorabókhaldinum

Eitt starv í kreditorabókhaldinum á gjaldstovuni er leyst at søkja.

**Arbeiðsuppgávurnar eru í høvuðsheitum:**
- skanna fakturar
- skráseta grundardátur
- skráseta útlendsk gjaldoyru
- skráseta afturvendandi rokningar
- skráseta í høvuðsbókhaldi
- avgreiða fyrispurningar m.a. um útgjaldingar
- vegleiða stovnum í ymsum fyrispurningum
- leita fram skjøl og arkivera
- feilrættingar

Viðkomandi kann verða settur til onnur arbeiði innan roknskaparhaldið.

**Krøv til starvið:**
Hægri handilsskúli e.t. og/ella viðkomandi arbeiðsroyndir. Tað týdningarmesta er, at viðkomandi skilir væl bókhald, hevur góðan ordan í sínum arbeiði og hevur lætt við at hava yvirlit. Arbeiðið á stovninum er í stóran mun skipað í bólkum. Tí skulu tey, ið verða sett, hava góð samstarvsevni og gera sítt til, at bólkurin arbeiðir væl saman.

Gjaldstovan kann bjóða eitt spennandi arbeiðsumhvørvi, har fakliga stigið er í støðugum framburði, og har tað verða brúkt framkomin EDV-amboð.

**Setanarviðurskifti:**
Arbeiðstíðirnar eru 39 tímar um vikuna, og starvið er lønt samb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í Bólki II. Meira fæst at vita við at venda sær til gjaldstovuna á tel 35 24 00.

**Umsókn:**
Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða sendar til Føroya Gjaldstovu, Traðagøta 39, Boks 2009, 165 Argir. Umsóknarfreistin er 26. mars 2007.

DIMMALÆTTING 341200